# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

*Vónirnar eru góðar, og alt annað enn fyrsta pláss hevði verið eitt sindur skuffandi*

*Helgi Dam Ziska undan FM í snartalvi leygardagin*

## Týskland vann 13-0 á San Marino

Meðan fleiri av hinum smáu tjóðunum í Europa í kvøld hava megnað heiðurlig tap móti stórum fótbóltstjóðum, so hilnaðist tað í kvøld illa hjá San Marino, sum hevði vitjan av Týsklandi. Týskararnir vóru eirindarleysir, og teir vunnu 13-0, eftir at tað í steðginum hevði staðið 6-0. Í metstóra sigrinum skoraði Lukas Podolski fýra mál, Bastian Schweinsteiger, Miroslav Klose og Thomas Hitzlsperger skoraðu tvær ferðir í part, og hini málini skoraðu Michael Ballack, Arne Friedrich og Bernd Schneider.

Í undankappingum til EM og HM í Europa var talan um metstóran sigur. Metið frammanundan átti Týskland eisini. Undan HM endaspælinum, sum var í Meksiko í 1970, vann Týskland undankappingardyst móti Kypros 12-0.

Í sama bólki var Kekkia á útivølli móti grannunum í Slovakia, og har var eingin ivi. Tá ið 21 minuttir vóru farnir, hevði Libor Sionko skorað tvær ferðir fyri Kekkia, og í 57. minutti staðfesti Jan Koller, sum er komin fyri seg aftur eftir skaðan, sum oyðilegði HM endaspælið fyri hann, 3-0 sigurin.

## VB/Sumba tveitt úr 1. deild

Tað hevur gingið illa hjá VB/Sumba í 1. deild í ár. Liðið liggur til niðurflyting, og meira enn einaferð hevur liðið tapt stórt – einu ferðina heili 20-0 ímóti AB. Harafturat hevur liðið ikki møtt til tveir av sínum dystum, og tað hevur nú fingið avleiðingar.

Kappingarnevndin hjá FSF hevur gjørt av, at VB/Sumba verður koyrt úr kappingini í 1. deild, og øll úrslit hjá liðnum higartil í ár verða strikað. Tey, sum hava vunnið trivaligan sigur á VB/Sumba, missa tí bæði stigini og málini.

Fyri VB/Sumba merkir tað, at liðið endar aftast í 1. deild við ongum stigi og ongum máli, og liðið flytir tí niður í 2. deild til næsta kappingarár.

# Sivic hevur fingið nýtt starv

**Tomislav Sivic, sum herfyri varð koyrdur úr einum venjarastarvi, er blivin venjari hjá felagnum Spartak úr heimbýnum Subotica**

FÓTBÓLTUR
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*



*Tomislav Sivic er nú boðsendur at hjálpa kreppurakta felagnum FC Spartak í heimbýnum Subotica*

*Mynd: Alexandar Djorovic*

Tomislav Sivic, sum í átta ár var venjari og spælari í Føroyum, hevur nú fingið nýtt starv, eftir at hann var sekkjaður í felagnum FC Vozdovac herfyri.

Nú vóru boð eftir Sivic úr heimbýnum Subotica, har felagið FC Spartak, sum spælir í næstbestu deildini, er í kreppu.

FC Spartak hevur bert fingið eitt stig í fimm dystum, og tí valdi leiðslan í felagnum at senda venjaran Bajic Srdjan til hús. Nú verður so litið Tomislav Sivic upp í hendurnar at venda skeivu gongdini.

### Vætna sær nógv av Sivic

Ítróttarstjórin í FC Spartak, Milenko Popovic, sigur við serbiskar fjølmiðlar, at teir vænta sær nógv av samstarvinum við Tomislav Sivic, og hann ivast ikki í, at úrslitini fara at batna. Sivic hevði sína fyrstu venjing í Spartak mikudagin.

Tomislav Sivic var í átta ár eitt kent andlit í føroyskum fótbólti. Hann byrjaði sum spælari og venjari í VB í 1995, og í 1997 skifti hann til B36, sum hann gjørdi til føroyameistarar fyrsta árið. Í 2000 og 2001 var Sivic venjari í KÍ, áðrenn hann fór av landinum aftur. Síðani hevur hann starvast heima í Serbia.

# Føroyar og Italia liggja í botninum

**Heimsmeistararnir Italia hava bert fingið eitt stig í tveimum EM-undandystum og liggja nú aftast í EM-bólki B saman við Føroyum**

EM-FÓTBÓLTUR
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Í gjárkvøldið var ein ørgrynna av landsdystum í EM-undankappingini spæld ir kring Europa, og í EM-bólki B, har Føroyar eru eitt av londunum, vóru tríggir dystir spældir.

Italia var undir trýsti, eftir at liðið byrjaði við javnleiki á heimavølli ímóti Litava, sum verður roknað sum eitt av veikaru liðunum í bólkinum. Í gjárkvøldið spældi Italia ímóti Fraklandi í París, og endurtøkan av HM-finaluni endaði við sigri til Frakland.

Sidney Guvou legði Frakland á odda longu í fyrsta minuttir, og eftir 18 minuttir økti Thierry Henry til 2-0. Italia svaraði skjótt aftur við máli frá Gillardino, men franski sigurin var staðfestur í seinna hálvleiki, tá ið Guvou skoraði til endaliga úrslitið 3-1.

Heimsmeistararnir Italia hava fingið vánaliga byrjan í EM-undankappingini, og liðið hevur nú eitt stig fyri tveir dystir og liggur beint frammanfyri Føroyar í botninum í EM-bólki B.

### Skotland vann aftur

Tveir aðrir dystir vóru í okkara bólki mikukvøldið.

Ukraina hevði heimavøll ímóti Georgia, sum Føroyar taptu 6-0 fyri, og annan dystin á rað noyddist Georgia at lúta. Andriy Schevchenko legði Ukraina á eftir ein hálvan tíma, men síðani skoraði Georgia tvær ferðir.

Ukraina javnaði minuttir eftir, at Georgia hevði lagt seg á odda, og 10 minuttir fyri leiklok skoraði Andriy Rusol sigursmálið fyri Ukraina.

Skotland, sum vann 6-0 á Føroyum leygardagin, spældi á útivølli ímóti Litava, og Skotland vann dystin 2-1. Christian Daily og Kenny Miller løgdu Skotland á odda 2-0, og fimm minuttir fyri tíð minkaði Darius Miceika til endaliga úrslitið 2-1.

**EM-bólkur B**

| | | Dystir | Mál | Stig |
|---|---|---|---|---|
| 1. | Skotland | 2 | 8-1 | 6 |
| 2. | Frakland | 2 | 6-1 | 6 |
| 3. | Ukraina | 1 | 3-2 | 3 |
| 3. | Georgia | 3 | 8-6 | 3 |
| 4. | Litava | 2 | 2-3 | 1 |
| 5. | Italia | 2 | 2-4 | 1 |
| 6. | Føroyar | 2 | 0-12 | 0 |